## DAGSINS MEINING

# Tillukku!

Uttan mun til hvørt vit eru fyri ella ímóti kongshúsi, uttan mun til um vit heldur vilja hava republikk við fólkavaldum forseta, so fegnast flest øll um kongaliga giftarmálið tann 14. mai í Keypmannahavn. Føroyingar flestir uttan mun til politiskan lit eru rættiliga konga-trúgvir. Hetta gongur heilt aftur til gamlar dagar, tá landsmenn vendu sær til kongs, tá ið teir høvdu verið illa viðfarnir av kongsins egnu embætismonnum. Hóast politiskar ósemjur, so tykist tað sum flestallir føroyingar eru góðir við okkara felags kongshús. Tá Margretha, drotning vitjar, fer maður av húsi at fagna hátignini uttan mun til politiskan lit ella annan meiningsmun. Tað var tí heldur valla av tilvild, at fullveldisætlanin fevndi um varðveitlsu av felags kongahúsinum.

Seinasta fríggjadag sótu flestøll sum undir lestri, meðan Fríðrikkur og Mary Donaldson vórðu samanlisin. Hetta var eitt sera vakurt og tignarligt hátíðarhald, og einki løgið er í, at einki eyga var turt kring kongsríkið. Nú kemur so gerandisdagurin, og nýggja parið skal standa sína roynd. Tað er eingin løtt uppgáva at røkja ein túsundáragamlan stovn sum kongsvaldið í eini tíð við krøvum um økta demokratisering og støðugt skjótari nútímansgerð av samfelagnum. Men so løgið tað ljóðar, gerast røddirnar, sum krevja forseta heldur enn kong, færri og færri.

Hetta stavar ivaleyst frá fleiri orsøkum. Vit liva í eini tíð, sum krevur upplivingar, kenslur og súmbolir. Av somu orsøk leingist fólki eftir positivum súmbolum og upplivingum. Afturat hesum kemur, at danska kongshúsið hevur dugað at laga seg eftir skiftandi tíðum og skiftandi samfelagsumstøðum. Tað, sum ivaleyst hevur havt størsta týdingin, er, at kongshúsið hevur skilt og virt sína ópolitisku støðu sambært grundlógini. Kongshúsið hevur bert savnandi, umboðandi og súmbolskan týdning. So leingi kongshúsið heldur seg til hesar meginreglur, verður tað góðtikið sum ein týðandi partur av fólkaræðinum. Alt bendir á, at Fríðrikkur og Mary eru framúr væl skikkað til henda leiklut, og tí tykist kongshúsið at hava góðan byrð í eini tíð, har annars alt broytist. Vit ynskja kongliga brúðarparinum til lukku og vóna, at hjúnarlagið skal vera til gagns fyri lond og ríki. Og vit vóna somuleiðis at síggja tey í Føroyum um ikki so langa tíð. Tey skulu vera hjartaliga vælkomin.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Atlantsflog, Maersk ella bæði

**Christian Weihe**

Júst afturkomin á einum hugnaligum túri við Atlantic, har flogternurnar vóru sera fyrikomandi. Tænastan umborð var í topp, snøgt sagt einki at klaga um.

Sá síðan í Degi og Viku, at Atlantsflog hevði havt aðalfund, og teir kundu leggja ein positivan rokniskap fram. Hettar er sera gott, og er at gleðast yvir, serliga í hesum tíðum har tey flestu flogfeløgini hava hall.

Tað er sera gott at føroyingar stuðla sínum felag. Men, tað er vandi í hvørjari vælferð.

Maersk hevur flogið uppá Føroyar í nógv ár, og hava teir ivaleyst havt stórt yvirskot á hesi rutuni, øll tey árini teir vóru einsamallir. Prísirnir lækkaðu ikki fyrr enn Atlantsflog byrjaði.

Tað sær út til at ganga tann skeiva vegin við ferðafólki hjá Maersk, og tann positiva vegin hjá Atlantsflog. Hetta skuldi bert verið at glett seg yvir. Men gevst Maersk at flúgva uppá Føroyar, tí ov fá flúgva við teimum, fara prísirnir nokk tann øvugta vegin fyri tey ferðandi. Leiðslan í felagnum, sum verður eftir, skal nokk duga at koma við einari góðari grundgeving, hví prísirnir skulu hækka.

Tað er gott, at vit føroyingar standa saman um okkara felag, men spurningurin er so um vit standa so væl saman, at prísirnir fara at hækka.

Tí er spurningurin, um tey sum flúgva, ikki burdu skift eitt sindur millum feløgini, so bæði vera verandi á marknaðinum. Tá verður framhaldandi kapping, til fyrimun fyri ferðafólkini.

# Um at útflyta tónleik

LISA – Listafólkasamband Føroya – skipar fyri skeiði um at fara út á altjóða tónaleikarapallin - Konsertferð og marknaðarføring.

Skeiðið verður í Pætursarstovu týskvøldið 25. mai kl.19, har Sigrid J. Dalsgaard, samskipari hjá TÝR, og Kristian Blak frá TUTL siga frá sínum royndum viðvíkjandi at skipa fyri konsertferðum, markndarføring og at skapa sølumarknað uttanlands.

# Opið hús á fornminnissavninum hvønn sunnudag í summar

**Í summar er Fornminnissavnið opið hvønn dag frá sunnudegi 16. mai til sunnudag 12. september, bæði framsýningarnar í Brekkutúni og útisavnið í Hoyvík**



SAVN

Leygardag og sunnudag er opið frá kl. 14 til 17, meðan tað gerandisdagar er opið frá kl. 10 til kl. 17. Fyrsta hvítusunnudag er stongt, men aðrar heilidagar er opið sum sunnudag.

Ein lítil broyting er, meðan fiskivinnuframsýningin stendur í gerð.

Seinni í summar letur upp ein gestaframsýning, nevnd "Úrtøka úr felags havi".

Fyri at gera savnið meiri atkomiligt hjá rørslubrekaðum, fingu vit í 3. desember í fjør, sum er dagur teirra brekaðu, sett eina lyftu upp, so at møguligt er hjá fólki í koyristóli at sleppa inn í allar partar av framsýningini.

Sum nakað nýtt hava vit nú enn fleir bøkur í sølubúðini í framsýningini, eins og ymisk postkort verða til sølu. Um stutta tíð ber til hjá vitjandi at rinda við gjaldkorti.

Nýggja heimasíðan hjá fornminnissavninum hevur bústaðin: www.natmus.fo

Ætlanin er at heimasíðan verður brott og víðkað alla tíðina, so áhugað kunnu fáa sær kunnleika um savnið og virksemi hjá savninum eisini henda vegin.

Millum annað er í umbúna at leggja stóra myndasavnið hjá savninum út á heimasíðuna.

– Ferðast í egnum landi - frí í Føroyum - vitja søvnini, sigur Regin Debess, savnslærari í tíðindaskrivi.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Seinasta viðmerkingin til Hergeir Nielsen

**Jacob Vestergaard**



Hergeir Nielsen heldur áfram at verja framferðarháttin viðvíkjandi ætlaða meginbókasavninum. Ein framferðarháttur, sum beindi fyri savninum.

Serliga hugtakið um meginbókasavnið kom úr erva, sigur Hergeir Nielsen, og satt er tað. Í staðin fyri at leggja hugskotið fyri kommunurnar, sum skuldu bera ætlanini uppi fíggjarliga, var var ætlanin at trýsta savnið niður yvir kommunurnar.

Landsbókavørurin, sum var ein av høvuðsmonnunum aftan fyri bókasavnslógina og ætlanina við meginbókasavninum, sigur m.a. soleiðis í fundarfrágreiðing aftan á fundin í Stórapakkhúsi: "Ynskir ein kommuna, av onkrari orsøk, ikki at virka í einum slíkum samstarvi, so má hetta takast upp til viðgerð á øðrum stað, og so kann tjakast og støða takast til, um hetta eigur at fáa fylgjur og møguliga hvørjar. - Er tað ikki nettupp í hesum førinum, at tað er so umráðandi, at vit hava eitt lógarverk, sum sigur, at soleiðis verður tað, punktum finale."

Hetta er greið tala, og seinri í somu frágreiðing verður hildið áfram: "Tað, at ein pinkukommuna ongan bókasavnspolitikk hevur ella bara hevur ein vánaligan politikk á økinum, kann ikki forða einari størri kommunu í at økja um sítt bókasavnsvirksemi. Verður hetta endin, er tað tað sama sum at siga, at sumbingar skulu ikki hava játtan til eina bakkaverju, tí hvørki vágbingar ella tvøramenn hava brúk fyri eini slíkari!!??"

Tey sum loyva sær at hava eina aðra hugsan mugu ruddast av vegnum beinan vegin, sum tað eisini framgongur av frágreiðingini, har sagt verður: "Mín hægsta vón er tí, at Mentamálaráðið, Vágs kommuna og vit øll fáa ruddað hetta grúsið av vegnum umgangandi".

Hví Hergeir Nielsen verjir slíka niðurgerð av kommununum í Suðuroynni, er ilt at meta um. Hann átti heldur at átala slíkan ágang, sum jú beinir fyri øllum samstarvsvilja.

Ongin suðuroyingur, heldur ikki Jacob Vestergaard ella lærarar við miðnámsskúlan, eru ímóti, at bókasavn verður bygt í Vági. Tað sum lærararnir vóru ímóti, var at blanda meginbókasavnið uppí miðnámsskúlan, ella rættari, bókasavnið á skúlanum.

Hetta framgongur av fleiri skrivum, sum liggja í málinum, m.a. skrivið frá læraraumboðnum, sent tann 28. mai 2002 til landsstýrismannin í mentamálum, har sagt verður m.a.: "Men lærararáðið á Miðnámsskúlanum meinar ikki, at mynduleikarnir eiga at blanda hesar tørvir saman í eitt bókasavn, sum samstundis er alment bókasavn".

Í brævi til Mentamálaráðið, dagfest 4. juli 2002, viðgerð sama læraraumboð spurningin, og sigur m.a. í samandráttinum: "Mælt verður frá at blanda nýggja bókasavnið og skúlabókasavns Miðnámsskúlans saman - og á nakran hátt at lata tey treyta hvørt annað, tí tað kann fáa keðiligar avleiðingar fyri Miðnámsskúlan, so hann ikki fær nýtt sítt egna bókasavn til fulnar".

Jacob Vestergaard hevur ikki uppfunnið nøkur "serlig prinsippur" at byggja bókasøvn eftir. Tað "serliga prinsippið" um meginbókasøvn var uppfunnið í Mentamálaráðnum.

Tað "serliga prinsippið", sum Hergeir Nielsen nevnir, er uppfunnið fyri langari tíð síðan, og var nýtt tá landsbókasavnið var bygt.

Landsbókasavnið hevur til uppgávu at veita tænastur kring alt landið, og tí var tað heilt náttúrligt, at ein deild av landsbókasavninum var bygd í Suðuroynni. Vit gjalda jú øll til landsbókasavnið, men fáa ikki somu tænastu sum tey, ið búgva kring landsbókasavnið. Tí er tað ein sjálvsøgd uppgáva hjá landinum, at veita øllum somu tænastu á bókasavnsøkinum.

Hergeir Nielsen veit sjálvsagt, at miðnámsskúlin í Suðuroynni hevði fremstu raðfesting, og hevði verið komin væl longur ávegin, sum ætlanin við meginbókasavninum ikki var tengd uppí verkætlanina.

Fólkaflokkurin og andstøðan hava sjálvtsagt ikki roynt at boykotta miðnámsskúlan, sum Hergeir Nielsen vil verða við.

Tað er ikki gott at vita hvørjum politiskum umhvørvi Hergeir Nielsen ferðast í. Samstundis sum hann tosar um breiðan uppbakning í Løgtinginum fyri miðnámsskúlanum, leggur hann Fólkaflokkin og táverandi andstøðuna undir at hava roynt at boykotta miðnámsskúlan. Hetta hongur als ikki saman, Hergeir Nielsen.

Suðuroyggin var veruliga sett á Føroyakortið undir síðstu samgongu, sigur Hergeir Nielsen, og satt er tað. Hann gloymur bert at upplýsa, at tað var Fólkaflokkurin sum umsat vinnumál, og stóð fyri teimum stóru íløgunum.

Burtursæð frá miðnámsskúlanum og meginbókasavninum, er ivasamt hvussu stóran leiklut Hergeir Nielsen hevur havt í hesum framtøkunum fyri Suðuroynna. Hansara serligi arbeiðsháttur setur avmarkingar í so máta.

Handfaringin av teimum málunum sum Fólkaflokkurin hevði við at gera, var munandi betur enn handfaringin av málinum um miðnámsskúlan/meginbóka savnið. Tað er nýggi Smyril eitt gott dømi um.

Ætlanin viðvíkjandi Smyrli var løgd fyri suðuroyingar á almennum fundi, har suðuroyingar sluppu at siga sína hugsan. Suðuroyingar gjørdu vart við seg, og komu við ymiskum broytingum, sum blivu tiknar til eftirtektar. Smyril bleiv "skraddaraseymaður" til tørvin hjá suðuroyingur, og áðrenn arbeiði var sett í gongd, var endaliga verkætlanin løgd fyri suðuroyingar á almennum fundi.

Hevði sami framferðarháttur verið nýttur viðvíkjandi miðnámsskúlanum og meginbókasavninum, hevði støðan ivaleyst verið ein onnur.

Trupuleikin við meginbókasavninum var jú, at bert Vágs- og Fámjins kommuna vildu verða við í ætlanini, tá av tornaði. Tað í sær sjálvum átti at sagt Hergeir Nielsen, at framferðarhátturin var skeivur.

Fuglurin, sum Hergeir Nielsen "helt" seg hava í hondini, var ikki har, - hann var ikki í eygsjón. At "halda" seg hava tað rætta tilboði, er snøgt sagt ikki gott nokk. Heimaarbeiði var ikki nóg væl gjørt, tí "hvarv savnið".

Eg skilji væl at Hergeir Nielsen følir avmegd. Teir settu sær stór mál, men politiski førleikin stóð ikki mát við ætlaninar.

Hvørjum Hergeir Nielsen hevur ilt av, er ikki gott at vita, men okkurt er tað, sum liggur aftanfyri skriving hansara. Eg skal ikki fara at gita, hvør orsøkin er, men at leggja meg undir at hava ilt av onkrum í Vági, er at skjóta út í tóman heim, og kann ikki byggja á annað enn óndsinnaðan hugsunarhátt.

Eg fegnist um øll framtøk í Vági, og vóni, at tær ætlanir, sum eru stungnar út í kortið, fara at vinna frama, og koma at menna Vág aftur vinnuliga.

Hergeir Nielsen hevur verið í landspolitikki síðan síðst í 70-árunum, og hóast avrikini ikki hava verið mong, er ymiskt ein kundi trivið í, men slíkt tænur neyvan nøkrum endamáli, og verður tí ikki gjørt her.

Politiski avrikini kunnu vera ymisk, og eru tengd at, hvørjum ein er í samgongu við. Sjálvur var eg landsstýrismaður fyri alt landið, og ikki bert fyri Suðuroynna. Hergeir Nielsen kundi kanska útgreina hvat hann hugsar um, tá hann nevnir, at lansstýrismaðurin í fiskivinnumálum "vóð í møguleikum".

Suðuroyggin, og serliga sunnara helvt av oynni, hevur ongantíð havt størri brúk fyri politiskari vælvild enn nú.

Tí kann eg endurtaka, at allar góðar kreftir í Suðuroynni, eisini Hergeir Nielsen, eiga at standa saman um oynna, fyri at vinna Suðuroynni frama.

Tað skal verða mín vón, at onkur av teimum ætlanunum, sum fyriliggja, fara at bera ávøkstur.

# Eigur at verða bíligari hjá næmingum í starvsvenjing at ferðast

**Michael Gram**
*Sørvágur*

I et brev til Mentamálaráðið i det tidlige forår redegjorde jeg for det urimelige i, at skolepligtige børn skal betale fuld pris for brug af de offentlige transportmidler ved kørsel til og fra praktikpladser i 9. og 10. skoleårgang.

Det er ingen overraskelse, at det største udvalg af praktikpladser forefindes i Tórshavn. Omvendt har de fleste bygder ikke mange attraktive erhvervspladser at tilbyde unge mennesker.

14 dages praktik er i nogle tilfælde forbundet med udgifter, der overstiger 2.000 kr. Da der er undervisningspligt, og dermed også pligt til at søge praktikplads, er det i mange tilfælde en stor økonomisk byrde at pålægge børn i 15-16 års alderen.

Mentamálaráðið svarede, at det ikke vedkom Landsstyret at bevilge rabat på det offentlige transportsystem i denne forbindelse, idet børnene hører under det kommunale skolesystem. Trods det faktum, at det er Landsstyret, der »scorer kassen«, skubber man altså aben over på kommunernes skuldre.

Sørvågs Kommune skrev i et svar på forespørgsel om muligheden for at opnå rabatordninger (med henvisning til brevet sendt til Mentamálaráðið) at man ikke ville give støtte til praktikanter, »fordi normal praksis foreskriver, at forældre til børn, som vælger at søge praktikplads uden for øen, selv betaler transportudgifterne«. Altså: Et nej, fordi »det plejer vi ikke at gøre«. Ingen argumentation. Minder mest om, at man som barn på forespørgsel om hvorfor, blev spist af med ordene: »Fordi jeg siger det!«.

Dette læserbrev skal være en opfordring til Mentamálaráðið om at etablere en rabatordning til praktikanter i 9. og 10. klasse i lighed med den, som studerende på de højere niveauer benytter. Samtidig skal jeg opfordre Sørvågs Kommune til at yde lidt bedre service, når en borger gør sig den umage at bruge flere linier på at argumentere for sit budskab. Det er ikke befordrende for dialogen –ej heller forståelsen at blive spist af på den måde.

# Stór lomb

**Thormann Kruse**

Hin 14. mai varð rikið av bønum. Tá hevði seyðurin ikki bitirætt í bøi og innangarðsjørð longur, smb. Hagalógini. Men ongin grund er at bera skjótt at. Nú gróðurin er komin rættuliga fyri seg, gerast lombini næstan 100g tyngri hvønn dag. Gingu tey á bønum alt summarið, vigaðu tey 10 kg meir í meðal!

Soleiðis sigur Bolli við meg, meðan hann hyggur út á bøin, har lombini spæla. Hugsa tær, at fáa lomb uppá 50 pund í miðal! Eg hyggi eitt sindur spyrjandi uppá hann, og mutli okkur sum: so verður onki hoyggja? Nei nei. Tað er ikki neyðugt. Vit keypa bara eitt sindur av hoyggji. Tað er ikki so dýrt, og so kraftfóður, tað skulu vit hava allíkaval!

Hvussu við eplunum, spyrji eg. Tað er ongin sum tímir at fáast við epli longur. Tað keypa vit eisini fyri næstan onki. Tað er ikki ómakin vert at fjasa við epli!

Eg gerist hugsunarsamur. Man meting Bolla vera alment galdandi? Man meinigi føroyingurin hava slept síni mentan? Og ber tað til bara at lata vera við at reka seyðin av bønum?

Túe Bolli, sigi eg. Kann man bara lata seyðin vera á bønum alt summarið? Hví ikki? Hagalógin sigur onki um at tað ikki ber til. Bert at um 2/3 av eigarunum ikki eru samdir um at gera tað soleiðis, so geri eg tað bara soleiðis, sum tað passar mær.

Men er onki eftirlit við at Hagalógin verður hildin? Nei nei. Bygdaráði hevur valgt eina hegnsýnisnevnd og har eri eg formaður. Tí kann eg gera sum mær listir.

Jamen. Eru ongar avleiðingar av hesum? spyrji eg. Nei! ongar. Um onkur dummur hundur ikki er samdur við mær, kann hann klaga til Landbúnaðarstevnuna. Tað ganga fleiri ár ímillum at henda kemur saman – so leingi, at táið hon endiliga er sett, so veit man ikki hví, og so fer hvør til sín.

Eg skilji onki av hesum. Og allíkavæl skilji eg alt nógv betur nú. Soleiðis er tað nógv einfaldari: Onki við at lata portrini upp á midnátt hin 24. Oktober, Ongir garðar og hegn at halda við líka, Ongi epli at hugsa um og onki at hoyggja.

Bara stór lomb til heystar.